Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Fyribyrgjandi kanningar fyri tarm- og prostatakrabba hjá monnum

Spurningar:

1. Hvussu nógvir menn fáa á hvørjum ári staðfest ávikavist tarmkrabba og prostatakrabba í Føroyum?
2. Kann landsstýriskvinnan upplýsa, hvussu nógvir menn verða grøddir og yvirliva, og hvussu nógvir menn doyggja við sjúkunum?
3. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at seta í verk eitt fyribyrgjandi screening-tilboð til menn fyri tarmkrabba og prostatakrabba, og um so er, nær?

Viðmerkingar:
Í Danmark hevur eitt skipað screening-tiltak fyri tarmkrabba verið í gildi síðan 2014. Tøl frá Kræftens Bekæmpelse vísa, at hetta hevur givið sera góð úrslit. Í 2024 vóru 24 prosent færri menn og 20 prosent færri kvinnur við tarmkrabba, enn áðrenn screeningin varð sett í verk. Samstundis er deyðiligheitin fallin markant.

Screeningin ger tað møguligt at finna og viðgera byrjanarstøði – smærri góðkynjaðar broytingar í tarminum – áðrenn tær menna seg til krabbamein. Tað merkir, at fleiri verða viðgjørd tíðliga, og hetta gevur munandi betri lívslongd. Saman við betri viðgerðartilboðum hevur hetta økt yvirlivilsið hjá teimum, sum fáa tarmkrabba.

Spyrjaranum kunnugt verða í fleiri londum framdar screeningar fyri prostatakrabba, sum er ein av teimum vanligastu krabbasjúkunum hjá monnum. Verður tað tíðliga staðfest, kunnu menn fáa mildari og meira virknar viðgerðir og minka bæði líðing og fíggjarligt trýst á heilsuverkið.

Í Føroyum verður ongin fyribyrgjandi kanning sett í verk fyri menn omanfyri til dømis 50 ára aldur. Hesin spurningur verður settur fyri at fáa greiðu á støðuni viðvíkjandi teimum báðum vanligastu krabbasjúkunum hjá føroyskum monnum, og um landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at virka fyri at kanna møguleikan fyri at seta í verk eitt fyribyrgjandi screening-tilboð fyri tarm- og prostatakrabba.

Á Løgtingi, 29. oktobur 2025

Johan Dahl